# Innbrot í Suðuroyar Sparikassa

**Tríggir menn brutu fríggjakvøldið inn í deildina hjá Suðuroyar Sparikassa í Havn. Tveir menn eru tiknir, men tann triðji enn gongur leysur**

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Fríggjakvøldið klokkan 23.23 fekk løgreglan fráboðan um, at tríggir menn høvdu brotið seg inn í deildina hjá Suðuroyar Sparikassa í Niels Finsensgøtu í Havn.

Tvey eygnavitnir hava sæð menninar inni í hølunum hjá sparikassanum, og tey hava boðað løgregluni frá tilburðinum.

Løgreglan fekk beinanvegin hendur á tveimum teirra, men tann triðji gongur enn leysur. Tað skilst, at løgreglan veit, hvør maðurin er, og tí gongur neyvan rúm tíð, fyrr enn hann eisini er settur fastur.

Innbrotið var als ikki umhugsað, áðrenn tað varð framt. Eftir øllum at døma hava menninir verið ávirkaðir av rúsevnum ella rúsdrekka, og tá teir brutu seg inn í sparikassan hjá suðuroyingum í Havn.



*Innbrot var í Suðuroyar Sparikassa um vikuskiftið, men gerningsmenninir fingu einki virðismikið við sær*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Varðhaldsfongslaðir

Teir tveir menninir, ið eru 31 og 29 ára gamlir, eru varðhaldsfongslaðir í tvær vikur, meðan løgreglan ger kanningararbeiði í sambandi við innbrotið. Tann triðji er um sama aldur.

Gerningsmenninir hava brotið seg ígjøgnum rútin í hurðini, sum er í gongini frá gongugøtuni. Vanliga eru rimar fyri um kvøldið, so fólk ikki sleppur inn í gongina, men hetta kvøldið vóru rimarnir ikki fyri.

Gerningsmenninir eru farnir væl um, tí einki herverk varð framt inni í hølunum. Sparikassin hevur nakað av peningi liggjandi inni, men hesin er væl tryggjaður í eini størri peningaboks.

Tann eini av innbrótarunum hevði nakað av hassji uppi á sær, og tí verður eisini ákæra reist fyri brot á narkológina.

Av kriminaldeildini verður sagt, at hetta innbrotið verður mett sum eitt hvørt annað innbrot.

Tá kanningararbeiðið er liðugt verður støða tikin til, um ákæra skal reisast móti monnunum, men lítil ivi er um, at teir verða revsaðir.

# Harðskapur í býnum

**Løgreglan hevur havt úr at gera um vikuskiftið, og leygarmorgunin varð ein maður so illa skorðin í andliti, at hann fekk seytjan pentur**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Leygarmorgunin klokkan 04.55 varð sjúkrabilurin boðsendur, tí ein maður hevði fingið stóran skaða av eini fløsku.

Tilburðurin fór fram uttanfyri Kunningarstovuna mitt í høvuðsstaðnum. Ein 31 ára gamal maður varð álopin við eini fløsku, tá tað kom til ilnar millum tveir menn.

Tann álopni fekk so stóran skaða, at hann varð seymaður á sjúkrahúsinum við seytjan pentum í andlitinum. Hann kundi fingið størri skaða, tí flikurnar eru nær við eyguni. Um illa vildi til, kundi maðurin verið blindur.

Gerningsmaðurin er kendur, men enn er hann ikki tikin av løgregluni, tí hann ikki er funnin.

Av kriminaldeildini verður málið mett sum "vold med særlig farlig karakter".

### Knívur á lofti

Fríggjakvøldið var nógv fólk á nýggja dansistaðnum Platform, tí vitjan var fingin úr kendur sendingini Baren.

Øði kom í ein mann, sum ikki slapp inn, av tí at hann var ov rúsaður. Hann tók ein knív fram og hótti duravørðin, ið stóð við hurðina. Knívurin var tíbetur ikki nýttur til at skaða nakran, men málið varð tó fráboðað løgregluni.

# Innbrot í Skálabúðini

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Leygardagin fekk løgreglan fráboðan um, at innbrot hevði verið í Skálabúðini í Havn. Gerningsmaðurin varð sloppin avstað við 5000 krónum í reiðum peningi, og harumframt hevði hann tikið fyri 13.000 krónur av kreditnotum, tá fólk rinda við gjaldskorti.

Hesum fær gerningsmaðurin ikki ágóðan av, men handilin missir pengingin.

Brotið varð inn ígjøgnum høvuðsinngongdina út ímóti vegnum. Karmurin varð brotin, so hurðin fekst upp.

Eingin er tikin í sambandi við hetta innbrotið, og løgreglan hevur ikki nakran serligan undir illgruna.

# Stuldur á Norðoyarstevnu

**Leygardagin komu nógv fremmanda fólk til Klaksvíkar. Tríggjar ungar gentur tømdu kassan í einum handli og fingu 2000 krónur við sær**

STULDUR
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Klaksvík sigur frá eini friðarligari stevnu. Tó varð eitt mál um stuldur fráboðað løgregluni.

Leygardagin seinnapart fekk handilin Trillan, ið selur konufólkaundirklæði, vitjan av trimum ungum gentum.

Starvsfólkið í handlinum hevur ikki hugt nóg væl eftir fremmandu gestunum, tí tá tær vóru farnar, varnaðust tey, at kassin var tømdur. Einar 2000 krónur eru tiknar.

Málið verður ikki kannað nærri, tí fólkið í handlinum ikki dugir at siga nágreiniliga, hvussu tær síggja út, og prógvini eru ikki nóg haldgóð.

Annars hevði løgreglan lítið at gera. Tilsamans hava tíggju fólk verið á støðini og sovið rúsin av, og tað er lítið á eini stevnu.

# Javnaðarfólk á summarstevnu



*Komandi vikuskifti heldur Javnaðarflokkurin árligu summarstevnu sína. Í ár verður hon á Svangaskarði á Toftum*

**Komandi vikuskifti heldur Javnaðarflokkurin summarstevnu á Svangaskarði á Toftum**

SUMMARSTEVNA
*John Johannessen*

Alt komandi vikuskiftið fara javnaðarfólk at hugna sær á summarstevnu í Eysturoynni.

Javnaðarflokkurin sigur í tíðindaskrivi, at summarstevnan er vorðin eitt afturvendandi tiltak hjá flokkinum, sum í ár hevur væl skipaða og vakra ítróttarøkið hjá toftafólki á Svangaskarði sum miðstøð.

### Leggja fyri við mentan

Javnaðarfólk seta hol á summarstevnuna fríggjakvøldið klokkan 20 við mentanarløtu í B68-húsinum, har gentukór úr Leirvík fer at syngja. Eisini fer fyrrverandi skúlaleiðarin í Gøtu, Petur Eli Mikkelsen, at siga frá søgum, landskenda Eyðvør Pálsdóttir fer at syngja og dugnaligar fuglfjarðargentur fara at leika á klarinett.

Ætlanin er eisini, at felagssangur skal vera á skránni fyri mentanarkvøldið, sigur Javnaðarflokkurin í tíðindaskrivi.

### Fólkafundur við Toftavatn

Leygardagin klokkan 11 bjóðar Javnaðarflokkurin morgunbreyð á Svangaskarði. Og síðani verður farið útferð út á Eystnes, har fyriskipararnir aftur bjóða ein góðan bita.

Seinnapartin leggur Javnaðarflokkurin leiðina til Toftavatn, har fólkafundur verður settur klokkan 18. Á fólkafundinum fara Jóannes Eidesgaard, formaður floksins, Jansy Olsen, næstformaður og Niklas Mikkelsen úr Gøtu at halda røðu. Eisini verður felagssangur.

### Veitsla

Eftir fólkafunin leggur Javnaðarflokkurin leiðina aftur á Svangaskarð, har veitsla við góðum mati, undirhaldi og livandi tónleiki verður til út á morgunin.



# Fáa flogvøllin í verandi líki



*Føroyingar kunnu yvitaka flogvøllin. Men danir lova ikki, at hann fyrst verður bygdur út. Hetta vóru boðini, tá Bjarni Djurholm í gjár hitti danska ferðslumálaráðharran*

*M ynd: Føroyska tíðindastovan*

**Føroyingar kunnu yvitaka flogvøllin uttan trupulleikar. Men danir útbyggja hann ikki fyrst. Hetta er úrslitið av samráðinginum mánadagin millum landsstýrismannin við samferðslumálum og danska ferðslumálaráðharran**

YVIRTØKA
*John Johannessen*

Tað stendur føroyingum frítt at yvirtaka flogvøllin í Vágum, nær tað skal vera.

Hetta vóru boðini frá danska ferðslumálaráðharranum, Jacob Buksti, tá hann í gjár hitti Bjarna Djurholm, landsstýrismann á fundi í Keypmannahavn um yvirtøku av flogvøllinum.

### Vilja ikki byggja út

Men danski ferðslumálaráðharrin gjørdi samstundis greitt, at spurningurin um at útbyggja flogvøllin ikki kemur upp á tal í samráðingunum um at yvirtaka hann.

– Eg fekk at vita frá danska ferðslumálaráðharranum, at vit kunnu fáa flogvøllin, tá vit ynskja tað. Men spurningurin um at byggja hann út fyrst, er ein samráðingarspurningur millum landsstýrið og danska fíggjarmálaráðharran ella forsætisráðharran. Danir teingja hendan spurning á ein hátt saman við búskaparligu viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark annars, segði Bjarni Djurholm við Sosialin beint eftir samráðingarnar mánadagin.

### Fáa eisini myndugleikan

Bjarni Djurholm og Jacob Buksti tosaðu eisini um møguleikan fyri, at føroyingar taka yvir loftferðslumyndugleikan. Og eisini her var danski ferðslumálaráðharrin sinnaður at finna eina loysn.

– Eg fekk at vita frá danska ferðslumálaráðharranum, at hann er sinnaður at samráðast um, at vit yvirtaka loftferðslumyndugleikan. Og hann var eisini sinnaður at finna eina loysn, so vit fáa neyðuga førleikan. Jacob Buksti sá onga politiska forðing fyri yvirtøkuni, segði Bjarni Djurholm beint eftir fundin í danska ferðslumálaráðnum í gjár.

Sambært Bjarna Djurholm var fundurin við Jacob Buksti ein sera positivur og greiður fundur.



*Gun Carlson og Tórbjørn Jacobsen á vitjan á maskinmeistaraskúlanum í Álandi í september í fjør. Á myndini síggjast Tórbjørn Jacobsen og Gun Carlson í stóra simulatorhølinum á maksinmeistaraskúlanum í Mariehamn*

*Mynd: MMS*

# Álendski mentamálaráðharrin vitjar

Gun Carlson, undirvísingar- og mentamálaráðharri Álandi, er í hesum døgum í Føroyum og kunnar seg um føroysk viðurskifti

VITJAN
*John Johannessen*

Álendski mentamálaráðharrin, Gun Carlson, kom fríggjadagin til Føroya at vitja. Endamálið við vitjanini er at kunna seg um føroysk viðurskifti sum heild.

Ferðin til Føroya kom í lag eftir, at Tórbjørn Jacobsen, fráfarandi landsstýrismaður í mentamálum, vitjaði í Álandi í fjør summar og tá beyð Gun Carlson at koma til Føroya at vita.

Í ferðalagnum er, umframt álendska skúla- og mentamálaráðharran, stjórin fyri undirvísingar- og mentamál í Álandi, Yvonne Eliasson.

Gun Carlson og Yvonne Eliasson fara úr aftur Føroyum í morgin.


## Starvsfólk til Fíggjardeildina

"Tað er annað til í verðini enn pengar. Til dømis kekkar og kreditkort..."
Ókendur



Til okkara Fíggjardeild verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. september 2001 ella skjótast gjørligt.

Í Fíggjardeildini starvast 4 fólk. Uppgávurnar hjá tí, sum settur verður, vera í fyrstu atløgu at gera uppgerðir, avstemningar og eftirlitsarbeiðið í samband við mánaðarroknskapir, ársfjórðingsroknskapir og ársroknskapir eins og at luttaka í sjálvum roknskapararbeiðinum. Saman við hinum starvsfólkunum í Fíggjardeildini verður tú eisini við í menningini av niðanfyri standandi uppgávum:

- ársroknskapi og øðrum tíðarskeiðsroknskapum
- budgettum, budgettuppfylging v.m.
- gjaldførisuppgerðum
- viðlíkahaldi av anleggskartoteki, herundir uppfylging av íløgum
- uppfylging av tryggingum
- ger av skrivligum mannagongdum v.m.
- ymsum ad hoc uppgávum

Vit kunnu bjóða tær at starvast í einum mennandi og avbjóðandi umhvørvi.

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Tann, sum settur verður, skal hava góðan kunnleika og royndir innan bókhald og/ella roknskapararbeiði frá líknandi starvi ella frá grannskoðara. Eisini er tað fyrimunur, um viðkomandi hevur

- hollan EDV-kunnleika
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag ella samsvarandi kvalifikatiónunum.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Joensen, fíggjarstjóra, tel. 303297 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Tel 303030, fax 303031, www.tele.fo

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!